# Manslandsliðið til Danmarkar




*Føroyska flogbóltslandsliðið skal um vikuskiftið finna Oyl formin, tá teir eru á venjingarlegu í Danmark*

**Seinastu fyrireikingarnar undan Oyggjaleikunum skulu nú fáast frá hondini**

FLOGBÓLTUR
*tíðindaskriv*

Føroyska manslandsliðið fer um vikuskifti á venjingarlegu í Danmark, har liðið millum annað skal leika ímóti donskum divisiónsliðum og Grønlendska landsliðnum, sum eisini er á venjingarlegu í Danmark.

Farið verður fríggjadagin 20. juni, og liðið leikar tveir dystir leygardagin og ein sunnudagin. Dysturin ímóti Grønlendska landsliðnum verður seinnapartin leygardagin.

Føroyar eru í bólki saman við Grønlandi, so dysturin fer at geva eina meting av leikligu dygdini hjá føroyska liðnum.

Føroyska manslandsliðið var ikki millum heiðursmerkjavinnararnar seinastu Oyggjaleikirnar, sum vóru á Man, men endaði sum nr. fýra. Men venjarin Jesper Brix og hjálparvenjarin Sune Hansen hava í ár sett sær hægri mál, og ætla at koma upp á heiðurmerkjapallin á Guernsey í ár.

Liðið hevur vant nógv saman seinastu tíðina, men stóri trupulleikin hevur verið, at tað er trupult at fáa dystarvenjing í Føroyum, og tí verður farið á hesa venjingarleguna í Danmark.

Føroyska flogbóltslandsliðið kemur aftur til Føroyar sunnukvøldið.

Íalt 12 leikarar verða við á túrinum.

# Fyrsta Tórshavn Marathon

**Stóra Marathon-kappingin hjá Bragdinum nærkast alsamt, og eru fyrireikingarnar so smátt um at vera av**

MARATHON
*tíðindaskriv*

Bragdið bjóðar rennarum úr Føroyum og útlondum til Atlantic Airways Tórshavn Marathon leygardagin 19. juli 2003.

Hetta er fyrsta marathonrenningin nakrantíð í Havn, men aðru ferð at hesin teinurin verður runnin í Føroyum. Fyrstu ferð, marathon varð runnið í Føroyum, var í samband við Oyggjaleikirnar í 1989.

### Eisini _ marathon og stuttleikarenning

Eisini verður møguligt at luttaka í hálvmarathon (21,1 km) og stuttleikarenning fyri vaksin og børn. Stuttleikarenningarnar verða tvær, ávikavist 5,8 km og 3 km.

Við stuttleikarenningini er ætlanin at fáa flest møgulig út at røra seg hendan dagin uttan at seta serlig krøv til skjótleika ella tíðir. Endamálið er at hava tað stuttligt og at seta ein serliga dám á miðbýin henda dagin.

Marathon-tiltakið í ár er fyrsta roynd av sínum slag hjá Bragdinum, og ætlanin er, at hetta skal verða eitt afturvendandi tiltak á hvørjum ári. Nakrir útlendingar koma at luttaka í ár, men komandi árini rokna vit við lutfalsliga stórari luttøku úr útlondum.

Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn, setur marathon-tiltakið og letur startskotið ganga.

### FM-kapping

Marathon-renningin er samstundis kapping um FM heitið, og teir rennarar, sum kappast um hetta heiti, skulu verða limir í einum av feløgunum fyri frælsan ítrótt í Føroyum.

### Startur og mál

Marathon og hálvmarathon byrja kl. 14.00 í miðbýnum og enda sama stað í miðbýnum. Stuttleikarenningin fyri vaksin byrjar samstundis sum marathon. Stuttleikarenningin fyri børn byrjar ein hálvan tíma seinni.

### Rutan

Allar kappingarnar byrja og enda í miðbýnum. Runnið verður fyrst 5,8 km runt í Havnini. Síðan verður runnið móti Kaldbak og aftur til Havnar, fram við Strond. 1/2 marathon-rennarar venda áðrenn Sundsverkið. Marathon-rennarar venda í Kaldbak. Allar rutur eru uppmáldar sambært AIMS reglur. Kort yvir allar ruturnar síggjast á heimasíðuni, www.athletics.fo

### Luttøkutreytir

Fyri at renna marathon skal ein hava fylt ella fylla 18 ár í ár, og fyri hálvmarathon er markið 16 ár, samstundis er miðvís marathonvenjing sjálvandi eisini ein fortreyt. Stuttleikarenningin er fyri øll og er býtt sundur í tveir bólkar. Upp til 12 ár renna 3 km, 13 ár og eldri renna 5,8 km.

### Luttøkugjøld

Marathon luttøkugjaldið er 250 kr., 1/2 marathon 200 kr., stuttleikarenning 5,8 km 100 kr. og stuttleikarenning 3 km fyri børn 50 kr.

### T-shirt

Íroknað luttøkugjaldið í øllum bólkum er ein marathon-T-shirt og ymiskt at drekka og eta á rutuni og í máløkinum.

### Tilmelding og gjald

Tilmelding kann gerast beinleiðis á heimasíðuni www.athletics.fo ella umvegis Kunningarstovuna í Havn. Luttøkugjaldið skal flytast á kontu í Føroya Banka 6460-166.239.4.

Gjaldast má beinanvegin í sambandi við tilmelding.

Tilmeldingarfreistin er 14. juli, og vit heita á allar luttakarar um at melda til í góðari tíð, soleiðis at fyrireikararnir betri kunnu fyrireika tiltakið.

### Heintan av startnr.

Allir rennarar mugu heinta startnr., T-shirt o.a. í Høllini á Hálsi fríggjakvøldið tann 18. juli millum kl. 19-22. Eisini verður møguligt at heinta startnr. í miðbýnum leygardag fyrrapart.

### Pastaparty

Fríggjakvøldið millum kl. 19-22 er pastaparty fyri marathonluttakarum í kantinuni á Hálsi í sambandi við útflýggjan av startnummari.

### Heiðran

Allir luttakarnir, sum koma á mál, fáa marathon heiðursmerki. Vinningar verða flogseðlar frá Atlantsflog til nr. 1, 2 og 3 hjá kvinnum og monnum í marathon. Lutakast verður millum allar luttakarar um flogseðlar frá Atlantsflog o.a. Heiðursmerki verða latin til nr. 1, 2, og 3 í øllum bólkum. Nærri verður lýst um vinningarnar á heimasíðuni.

### Drykkjuvørur og fyrstahjálp

Á rutuni ber til at fáa vatn og saft fyri hvørjar 5 km. Eisini verða fyrstahjálparar til reiðar á rutuni. Í máløkinum verða eisini drykkjuvørur og annað gott at fáa.

### Marathon-veitsla

Allir luttakarar í marathon og 1/2 marathon kunnu melda seg til sigursdøgurða, sum verður leygarkvøld kl. 21.00. Makar eru vælkomnir við. Nærri verður lýst um hetta seinni.

# Sundalagsstevna

**47 bátsmanningar eru teknaðar til kappróðurin á sundalagsstevnuni, sum í ár verður í Kollafirði. Grundað á úrslitini á fjarðastevnu eru bátarnir lagdir í hesa startrøð**

### 5-mannafør, dreingir

1 Junkarin
2 Fípan Fagra
3 Blikur
4 Havfrúgvin
5 Sílið
6 Tjaldrið
7 Royndin Fríða
8 Kollur

### 6-mannafør, kvinnur

1 Fuglfirðingur
2 Smyril
3 Páll Fangi
4 Gongurólvur
5 Lómur
6 Fortuna
7 Jarnbardur

### 5-mannafør, gentur

1 Kollur
2 Fípan Fagra
3 Firvaldur
4 Drekin
5 Blikur
6 Sílið
7 Havfúgvin
8 Ørnin
9 Junkarin
10 Hulda
11 Tjaldrið

### 6-mannafør, menn

1 Fortuna
2 Gongurólvur
3 Sundabáturin
4 Strálan
5 Smyril
6 Páll Fangi
7 Jarnbardur
8 Lómur
9 Sølmundur
10 Kollfirðingur
11 Riddarin

### 8-mannafør

1 Toftabaturin
2 Knørrur
3 Argjabáturin
4 Ørvur
5 Kvívíkingur
6 Teistin

### 10-mannafør

1 Vestmenningur
2 Nólsoyingurin
3 Eysturoyingur
4 Havnarbáturin

Vikuskifti

Nr. 115 • leygardagur • 21. juni 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

## Fólk trívast best í Norðurlondum

Álit er versnað millum fólk. Rinast stendur til í Bretlandi



Lesið síðu 3



*Á Musikkskúlanum er serligur gravgangur eftir at læra at spæla klaver. – Vit fáa ikki øll inn, sum vilja spæla klaver, sigur Helga Gerðalíð, leiðari á Musikkskúlanum í Klaksvík*

## Musikkskúlin:
# Børnini læra og mennast

**Helga Gerðalíð er leiðari á Musikkskúlanum í Klaksvík, og tað hevur hon verið í seks ár nú. Henni dámar stak væl hetta arbeiðið. - Tað er altíð stuttligt at arbeiða við børnum. Men tann størsti trupulleikin hjá okkum eru hølisviðurskiftini, sigur Helga Gerðalíð**

SAMRØÐA
*Ingrid Bjarnastein*

**Klaksvík:** Leiðarin á Musikkskúlanum í Klaksvík, Helga Gerðalíð, er íslendsk av uppruna. Men seinastu 22 árini hevur hon búð í Føroyum og seks av teimum hevur verið leiðari á Musikkskúlanum. Ætlanin hjá henni var av fyrstan tíð at søkja inn og vera í Føroyum í eitt ár. Men nú eru 22 ár liðin, og Helga er framvegis í Føroyum.

- Mær dámar væl arbeiðið her. Tað er altíð stuttligt at arbeiða við børnum. Orsøkin til, at eg kom til Føroya er, at familjan hjá mær hevði samband við føroyingar í samkomuni Betesda, og har høvdu vit nógv samarbeiði, og tí gjørdi eg av at søkja sum leiðari og verða her í eitt ár, sigur Helga Gerðalíð, leiðari á Musikkskúlanum í Klaksvík.

### Gravgangur

Helga ásannar, at gravgangurin at sleppa inn á Musikkskúlan, er framvegis stórur. Serliga er tað klaverspæl, sum stórur áhugi er fyri, men tað er tað allastaðni í landinum.

- Vit fáa ikki tikið øll inn, sum vilja spæla klaver. Tað ber ikki til bara at hava klaver. Vit hava nógv samstarv við Musikkskúlan í Odense, og har hava tey sett eina kvotu á klaver, soleiðis, at tað verður ikki meira enn 25% av næmingunum, sum eru klaverspælarar, og tað royna vit eisini her. Men hóast tað, so eru tað millum 30 og 40% sum spæla klaver, og tað er í so nógv,

*Framhald á næstu síðu*